# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fjarðafestivalur av bakkastokki

Í kvøld fer Fjarðafestivalurin 2007 av bakkastokki. Hetta er aðru ferð, at festivalurin í Skálabotni verður hildin, og við eini spennandi skrá við góðum blandi av útlendskum og føroyskum nøvnum vísir hesin festivalur, at vit eisini megna at skapa góðsku og tiltøk við kristiligum tónleiki í Føroyum.

Við amerikanska rokkbólkinum Pillar og svensku veteranunum Jerusalem á odda eru útlendsku nøvnini á sera høgum støði. Men uppaftur meira spennandi eru føroysku nøvnini. Røðin av bólkum við nýskrivaðum føroyskum tónleiki er long, og vísir at eisini á kristiliga tónleikapallinum er stór menning. Eitt av nýggjastu nøvnunum á kristiliga tónleikapallinum Martin í Grund vísti í samrøðu við Sosialin í gjár á hugburðurin millum unga ættarliðið av føroyskum tónleikarum. Tað er ikki longur nóg mikið, at boðskapurin er góður, tónleikurin skal eisini vera á høgum støði. Boðskapur eigur ongantíð at vera ein umbering fyri at gera sær ómak, sigur Martin.

Hesin hugburður er kristiligum tónleiki at frama, og sjálv grundin undir teirri menning, ið vit hava sæð á hesum palli seinnu árini. Góðskan er støðugt vorðin betri, og kristiligir bólkar finnast nú innan flest allar tónleikagreinir. Hetta er ein menning, sum í alt størri mun hevur kámað mørkini millum verðsligt og kristiligt. Tónleikarar, ið vanliga virka innan verðsligan tónleik, luttaka í bólkum við kristiligum boðskapi, og tónleikarar, ið vanliga virka innan kristiligan tónleik luttaka í bólkum við verðsligum boðskapi. Hetta er gleðiligt fyri føroyskan tónleik, tí tað kann ikki vera nakar ivi um, at tað at bestu kreftirnar samstarva er føroyskum tónleiki at frama. Skal tónleikurin mennast bæði sum listagrein og sum vinnuvegur er hetta einasta gongda leið.

Ein veteranur innan føroyskan tónleik, Martin Joensen, fer á pall á Fjarðafestivalinum í morgin. Hansara luttøka á Fjarðafestivalinum vísir í størri mun enn nakað annað, hvussu mørkini millum verðsligt og andaligt kámast, men hetta er ivaleyst nærliggjandi, tí sum Martin Joensen sjálvur sigur í Sosialinum í gjár: "Um Guð hevur skapt heimin, so er tónleikurin í heiminum ikki verðsligur". Vit ynskja fyrireikarum, luttakarum og áhoyrarum góða eydnu við Fjarðafestivalinum, sum eins og G! og Summar Festivalur er komin fyri at verða.

**Sosialurin**

## Nógv bíligari við Sandoyartunnli!



**PÁLL Á REYNATÚGVU**
løgtingsmaður og borgarstjóri

**Tora vit at hyggja langt fram í tíðina, sum vit í flestu førum eiga, og serliga við stórum samferðsluætlanum, so er lítið at ivast í at Sandoyartunnilin, umframt at vera ein góð samfelagslig íløga, somuleiðis er ein góð fíggjarlig íløga**

**Teistin ella tunnil**
Sæð í ljósinum av verandi samferðsluskipan av Skopunarfjørð er ikki trupult at finna stórar fyrimunir við einum komandi Sandoyartunnli. Og ikki er tað rímiligt einans at viðgera kostnaðin av Sandoyartunnlinum í ávíst áramál, uttan eisini at viðgera verandi farleið í ávíst áramál.

**100 ára ætlan**
Líta vit hundrað ár fram í tíðina, sum í minsta lagi er livitíðin hjá einum undirsjóvartunnli, so er kostnaðurin av Sandoyartunnlinum sum kunnugt áleið 690 mió. kr ella áleið sjey mió. kr um árið í 100 ár av íløgukostnaði.

**Raksturin hongur saman**
Rakstrarúrslitið eru nógv tengt at flutninginum gjøgnum tunnilin. Í verandi uppleggi frá Landsverki verður mett, at 700 akfør fara at koyra gjøgnum tunnilin dagliga, sum gevur eina inntøku uppá 12,8 mió. kr um árið. Útreiðslur til viðlíkahald og rakstur vera mettar til 8,1 mió.kr. um árið. Altso ein vinningur uppá 4,7 mió. kr um árið við tølunum frá Landsverki, um vit ikki taka íløguna við.

Yvir hundrað ár, við óbroyttum tølum, ein vinningur uppá lítla, hálva milliard krónur.

**Hallið hjá Teistanum**
Verandi rakstrarhall hjá Teistanum er áleið 10 mió kr árliga. Yvir hundrað ár gevur tað eina milliard í halli. Afturat tí skulu byggjast fimm nýggir "Teistar" í hesum hundrað ára tíðarskeiði, sum viðføra íløgur fyri áleið hálva milliard kr. Tá er ikki tikin hædd fyri møguligum ferjulegubroytingum í Skopun og á Gomlu Rætt, í samband við møgulig ferðslulop, ella broytt ferðamynstur.

Samanbering av rakstri og íløgu, av báðum samferðslumøguleikunum yvir hundrað ár.

"Teistin" Sandoyartunnil

**1) Íløga 1) Íløga**
-500 mió.kr -700 mió.kr
**2) Rakstur 2) Rakstur**
-1000 mió.kr + 470 mió.kr
**Kostnaður í alt:**
1500 mió. kr 230 mió.kr

Sjálvandi er hettar ein einføld uppseting við fleiri fyrivarnum, men við fyriliggjandi tilfari frá Landsverki, og við verandi rakstrarhalli hjá "Teistanum", er hettar ikki ein ósaklig uppseting.

Hvørjir fyrimunir er við tunlum, andvegis sigling um firðir og sund, kundi verið skrivað upp í rúgvuvís av bókum. Lættast er kortini at spyrja tey sum eru farin frá at sigla, til at koyra. Og tey eru ikki so fá eftirhondini í Føroyum.

Summa summarum. Tað er nógv bíligari við tunli enn við skipi sæð yvir tíðarskeiðið sum ein Sandoyartunnil hugsandi kemur at virka og tæna Føroya landi.

**Ger tunnilin og spar 85%**
Ráðini til føroyska samfelagið eru púra greið. Við at gera Sandoyartunnilin beinanvegin, sparir føroyska samfelagið 1270 mió. kr. komandi hundrað árini, ella 12,7 mió. kr. um árið. Ella nærum tvær ferðir kostnaðin av Sandoyartunnlinum.

Og tað er uttan iva peningur, sum kundi fallið á eitthvørt turt stað hjá landshúsarhaldinum. Kanska eisini í miðstaðarøkinum...

## SEV-stjórin fer frá

**Eftir at hava røkt stjórastarvið í SEV í hálvan mansaldur, hevur Klæmint Weihe í samráð við stýrið í felagnnum gjørt av, at royna nýggjar leiðir**

**STJÓRASKIFTI**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í morgun boðaði SEV-stýrið frá, at Klæmint Weihe fer úr stjórastarvinum í felagnum 1. oktober í ár. Tá hevur hann sitið í starvinum síðani 27. mai 1982 ella meiri enn 25 ár.

Klæmint byrjaði í SEV 1. januar 1980 sum verkfrøðingur, men tá táverandi stjórin, Hjalgrím Winther, gjørdist álvarsliga sjúkur, heitti stýrið á Klæmint um at taka yvir.

- Hetta er ikki nakað, sum er komið bráddliga á. Vit hava umrøtt hetta í longri tíð, og vit eru samdir um, hvussu vit skulu gera hetta nú, sigur Klæmint Weihe.

Hann sigur, at hetta hava verið spennandi ár í starvinum.

- Eg havi stórtrivist. Tað hevur verið nokk at tikist við og nógvar spennandi uppgávur at loyst. Sjálvandi hevur verið okkurt nosið, men tað má mann rokna við, tá mann situr í einum slíkum starvi, sigur Klæmint Weihe

Fráfarandi stjórin sigur, at skal hann royna nakað annað, so er tíðin komin til tess. Hann tekur við sum stjóri í Maskinverkstaðnum á Hjalla, tá hann leggur frá sær í SEV. Hann hevur keypt part í felagnum, sum hann fer at eiga saman við Sp/f Kerið, P/f Faroe Ship, P/f Alma og Sp/f VR-bilar. Somuleiðis tekur hann sæti í nevndini í P/f Stórutjørn.

### Sunt felag

Í tíðindaskrivinum sigur stýrið í SEV, at tað er í sátt og semju, at farið verður hvør til sítt. Og hóast Klæmint Weihe nú leggur frá sær sum stjóri, so fer hann at verða knýttur at felagnum í eina tíð fram sum ráðgevi, tí hann hevur so stóra vitan um SEV.

- Klæmint Weihe hevur lagt nógva arbeiðsorku í SEV, og tað er eingin loyna, at hann í 1982 tók við leiðsluni í eini fyritøku, sum var illa fyri búskaparliga. Harumframt gekst illa at nøkta vaksandi eltørvin, og elnetið var niðurslitið. Í dag letur hann eitt búskaparliga sterkt felag frá sær, sum reint tøkniliga eisini er ført fyri at taka við teimum nógvu avbjóðingunum, sum liggja fyri framman, sigur Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at stýrið vil hava góðar stundir at leita eftir nýggjum stjóra, og tí verður eingin settur í stjórastarvið í SEV 1. oktober. Miðað verður eftir at seta ein nýggjan stjóra 1. januar 2008 ella sum skjótast í nýggja árinum, og hesa tíðina verður Poul Arni Jacobsen virkandi stjóri. Hann er næstformaður í stýrinum, har hann hevur sitið síðani 1989. Hann var formaður í stýrinum frá 1993 til 2004.

Klæmint Weihe fyllir í næstum 57 ár.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.